Føroya Lærarafelag
Pedda við Stein gøta 9
Postrúm 3264
FO-110 Tórshavn
tlf. (+298) 31 68 63
fax (+298) 31 96 44
lararaf@lararafelag.fo
www.lararafelag.fo

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Tórshavn 26. januar 2009

Att. Jenny Lydersen

**Viðmerkingar til uppskot til Ll. um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

Í skrivi, dagfest 13. januar 2009, gevur Mentamálaráðið Føroya Lærarafelag møguleikar at gera viðmerkingar til uppskot um broytingar í fólkaskúlalógini. Talan er um broytingar í §§ 14 og 50 í lógini.

Viðvíkjandi einstøku punktunum:

1. Føroya Lærarafelag tekur undir við ætlaðu broytingina av § 14, stk. 5. Fyri tann einstaka næmingin, læraran og skúlaleiðaran er tað greiðari og tryggari, at reglur verða ásettar um, hvussu kanningarúrslitini frá landsroyndini skulu kunngerðast. Reglurnar geva frið á økinum, soleiðis at royndirnar kunnu brúkast til tað, sum tær eru ætlaðar til. Ásetingarnar um skerpaða tagnarskyldu viðvíkjandi royndarúrslitunum tekur lærarfelagið eisini undir við.

2. Føroya Lærarafelag tekur undir við fyrsta partin av broytingini av § 14, stk. 8. Hinvegin er okkara uppskot, at seinasta punkt verður strikað.

   Okkara uppskot er tí, at §14, stk. 8 verður orðað soleiðis: *" Næmingar og foreldur, sbr. § 65, skulu regluliga fáa at vita skúlans áskoðan um, hvat næmingarnir fáa burtur úr skúlagongdini. Foreldur og næmingar skulu verða kunnað um úrslitini í lands- og støðuroyndum, sbrt. stk. 2, 3 og 5. Mentamálaráðið sendir einstøku skúlunum úrslitini hjá teirra næmingum í landsroyndini. Tað áliggur skúlaleiðaranum at viðgera úrslitini frá landsroyndini saman við einstøku lærarunum og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast. "*

   Grundgevingarnar fyri at seinasta punkt verður strikað eru:

   Einstaki skúlaleiðarin hevur sambært § 55, stk. 2 í fólkaskúlalógini námsfrøðiligu ábyrgdina av undirvísingini, samanber eisini stk. 5 og 6. Hesar ásetingar eru galdandi fyri allar eftirmetingar og royndir, og eru fult nøktandi fyri landsroyndina eisini. Vit eiga at ganga út

27 JAN 2009
SKR. T. 70-31101
MÁL. T. 090337-46

frá, at skúlastjórar taka landsroyndirnar í fullum álvara og gera tær tillagingar í undirvísingartilgongdini, sum eru neyðugar. Mentamálaráðið hevur stóra arbeiðsbyrðu og hevur helst trupult við at halda skyldurnar við at hava yvirskipaða eftirlitið við øllum skúlaverkinum. Tað er tí ikki í lagi, at ein ráðharrastova fer undir at detailstýra og eftirkanna broyttar undirvísingarætlanir frá so at siga øllum skúlum í landinum. Hetta eigur at vera ein farin tíð. Vit eiga øll at hava álit á skúlastjórunum og trúgva uppá, at teir gera sítt arbeiðið og fylgja ásetingunum í § 55 í fólkaskúlalógini.

Landsstýrismaðurin hevur frammanundan heimild í § 57, stk.2 at gera kanningar av teimum skúlum, sum ikki røkka landsmiðaltalinum, og í tí sambandi biðja um allar upplýsingar og ætlanir. Tað er skilabetri, hevur størri ávirkan og er ein betri loysn bert at fara í samskifti við teir vánaligastu skúlarnar. Okkara tilmæli er tí at strika seinasta punkt í stk. 8. Alt annað gevur óneyðugt eykaarbeiði.

3. Ongar viðmerkingar

4. Ongar viðmerkingar

Føroya Lærarafelag tekur annars undir við broytingunum, sum eru góðar og neyðugar.

v/ Føroya Lærarafelag

Magnus Tausen, formaður